


*Torkil Veyhe, sum vann Statoil Kring Føroyar samanlagt, og Gunnar Dahl-Olsen, sum vann síðstu kappingina í gjár*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

# Gunnar vann spurtin

**SÚKKLING** Gunnar Dahl-Olsen var ein av fimm súkklarum, sum vóru á odda tað mesta av teininum í gjár, og tá teir nærkaðust málinum í einum øgiligum spurti, var hann tann drúgvasti og vann

Hilmar Jan Hansen

Hóast hann gongur ímóti teimum 46, er Gunnar Dahl-Olsen framvegis ikki lættur at syfta hjá teimum yngru súkklarunum. Tað fingu teir at kenna, tá endaspurturin hjá teimum fimm fremstu skuldi setast inn í miðbýnum í Havn í gjár, tá Statoil Kring Føroyar endaði.

Longu úti við Strond byrjaði taktiska spælið, har tað ráddi um at koma sær í best hugsandi støðu, og tá fekk Gunnar lagt lunnar undir sigurin, tí hann megnaði at plasera seg so væl, at hann kundi gerast fremstur av teimum fimm, tá teir allir komu á mál við somu tíð.

– Tá vit komu til Eik yviri við Strond, royndi eg at liggja væl fyri, tí eg kendi jú umstøðurnar, sum vóru, tá vit fóru at nærkast málinum, sigur Gunnar, ið ikki helt tað vera verri fyri seg, at hann visti, hvussu tað sá út, har teir skuldu royna at taka tey allarseinastu tøkini.

– Onkur av útlendingunum var eitt sindur ørkymlaður av teimum báðum rundkoyringunum, vit skuldu ígjøgnum, so tað gjørdi tað ikki verri fyri meg. Mín ætlan helt so allan vegin, og eg eri sera glaður fyri, at tað eydnaðist mær at vinna kappingina henda síðsta dagin.

## Ótrúliga hart

Umfram Gunnar og liðfelagan, Gudmund Joensen, ið beinanvegin fóru avstað, tá nakrir av útlendingunum royndu at skræða seg leysar longu í Saksunardali, vóru eisini Árni Már Jónsson, Jacob Agger Troelsen og Gunnlaugur Jónasson við í fremsta bólkinum tað mesta av teininum.

Súkklararnir byrjaði í brennandi sól í Tjørnuvík klokkan 14, men tað var nokk so skjótt, at føroyska veðurlagið spældi inn, so tað bleiv mjørki tað allarmesta av øllum teininum.

– Eg visti, at vit vóru sterkir og kundu klára tað. Uppgávan hjá Gudmundi og mær var at verja oddasessin hjá Torkili, men sum tað lagaði seg, sat hann longur afturi við góðum kortum á hondini, so vit kundu satsa uppá at fáa liðsigurin til høldar, sigur Gunnar Dahl-Olsen, ið viðgongur, at tað veruliga ráddi um at geva alt á teininum í gjár.

– Men hetta var bæði hart og spennandi, og fyri mítt viðkomandi var tað ótrúliga hart at koma av Gomlurætt niðan á Velbastaðháls. Tá mátti eg so royna at samla kreftirnar, so eg kundi vera við í endaspurtinum, og tað gekk tíbetur!

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Torkil stóri sig




*Tríggir teir bestu í samanløgdu kappingini: Kristian Gosvig, Torkil Veyhe og Gudmundur Joensen*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

**SÚKKLING** Aftur í ár gjørdist Torkil Veyhe stóri sigursharrin í Statoil Kring Føroyar, tí umframt at hann vann einstaklingakappingina, megnaði hann saman við Gudmundi Joensen og Gunnari Dahl-Olsen eisini at vinna liðkappingina

Hilmar Jan Hansen

Tað var í Suðuroynni, at Torkil Veyhe gjørdi tann stóra vørrin, ið tryggjaði honum samlaða sigurin í ársins útgávu av súkklukappingini, Statoil Kring Føroyar, ið endaði í gjár. Tá megnaði hann at vinna, hóast hann hevði tikið fleiri hørð tørn á leiðini, umframt at hann eisini punkteraði.

Men hóast Torkil vísti størform, var hann í gjár ikki bangin fyri, at geva liðfeløgunum ein part av heiðrinum. Saman við Gudmundi Joensen og Gunnari Dahl-Olsen mannaði Torkil liðið Team PE, sum vann liðkappingina.

– Bæði Gudmundur og Gunnar hava verið sera góð hjálp, og serliga í Suðuroynni lá væl fyri. Har brúktu vit øgiliga nógv Gudmund, og tað riggaði øgiliga væl. Hini liðini staðfestu tá eisini, at tað var øgiliga torført at fylgja við okkum, sigur Torkil, sum saktans kundi liva við, at hann ikki fekk sigurin á teininum í gjár, tí tað ráddi meira um at vinna samanlagt.

– Tað er sjálvandi altíð stuttligt at vinna í Havn, men í dag ráddi eisini um at vera realistiskur, tí eg hevði ikki kreftir til at taka teir aftur, sum vóru farnir undan. Eg sat saman við Hafsteinni Ægir Geirsson og Kristian Gosvig, so eg skuldi bara fylgja við teimum báðum. So skuldu Gudmundur og Gunnar taka sær av hinum báðum íslendingunum, ið kundu hótt støðuna hjá okkum í liðkappingini.

## Hevði tamarhald á

Á teininum í gjár lá Torkil mestsum alla tíðina eitt petti aftan fyri teir fimm, ið stungu av í Saksunardali, men hann valdi ikki at fara eftir teimum beinanvegin, tí hann var